# í menningarlæruni

man eitt apu-menniskja.

Men Dubois vildi ikki vísa dýrgripin fyri nøkrum øðrum. Alt sum hann vildi vísa var eitt gipsmodell, sum hildið verður, at hann hevði gjørt av einum skølti. Hann hevði funnið ein skølt og eitt lærbein. Tað var ógvuliga týðiligt at lærbeinið var av einum menniskja, eins týðiligt var, at skølturin var rættiliga apulíkur í útsjónd. Við at látast sum hesi vóru úr sama upphavi, setti hann tey saman og kallaði sameiningina "Pithecanthropus erectus".

Men Eugens Dubois segði ikki heiminum allan sannleikan. Hann segði ikki, at lærbeinið varð funnið umleið 50 føtur niðanfyri skøltin. Ei heldur segði hann, at á somu hædd sum apulíki skølturin, Pithecanthropus, varð funnin, vórðu tveir mannaskøltar (kendir sum Wadjak 1 og 2) eisini funnir. Hesir mannaskøltar høvdu eina skallarúmd, sum máldi umleið 1550 – 1650 cc. (helst meiri enn flestu



okkara hava).

Í 26 ár fjaldi Dubois hesar mannaskøltar undir gólvbrettunum á kamari sínum, tí hann visti, at um hann opinberaði, at hann fann hesar á sama hæddarstigi, og at teir eyðsýniliga vóru javnaldrar, so kundi Pithecanthropus ómøguliga vera forfaðir okkara. Áðrenn Dubois doyði, var hann komin til ta niðurstøðu, at skølturin hoyrdi til eina stóra gibbonapu, og at hetta als ikki var nakað apu-menniskja.

**Neanderthal Man**
Nú koma vit til eina aðra víðakenda "uppdaging": the Neanderthal Man. Eg eri vísur í, at tú kemst við "Homo neanderthalensis". Í síðstu øld varð ein nøgd av hesum beinagrindum funnin í Neander Dalinum nær Dusseldorf í Týskalandi. Hesar vórðu umskapaðar av einum palaeontologisti, nevndur Boule. Nú byrjaðu teir at prýða øll heimsins listasøvn og lærubøkur. Tú eigur at minnast myndir av Neanderthal monnum. Hesir vóru boygdir framyvir, og gingu á uttaru síðu á fótunum; høvdu ein gassa um herðarnar og dragsaðu konur sínar eftir hárinum. Hetta var hitt fullkomna apu-menniskja.

Seinni kom fyri dagin, at Neanderthal ikki einans hevði eingilska sjúku og liðagikt, sum elvdi til at hann gekk boygdur framyvir, men harafturat hevði Boule, sum hevði eina rúgvu av beinum at arbeiða við, umbygt hesi fyri at fáa Neanderthal at líkjast eini apu á best gjørligan hátt. Umbyggingin var so ótrúlig, at enntá stóratá vendi úteftir á fótinum, eins og var tað tummilin á eini apu. Ætlandi var tað hetta, sum fekk Neanderthal at ganga á uttaru síðu á fótunum.

Vit kunnu ikki koma uttanum niðurstøðuna, at Boule á ein ótrúligan hátt hevði umskapað hesar skapningar, fyri at fáa teir at líkjast apum. Nú eru nútíðar vísindamenn komnir til ta niðurstøðu, at hetta var eitt stórt svikabragd. Men aftur vóru milliónir av menniskjum lumpaði.

**Australopithicines**
Nú koma vit til "Australopithicines", ella "Southern apes" (suður apurnar), sum tær eru kallaðar. Palaeontologistar settu nú ljóskastaran á Afrika, har vit finna slík víðagitin nøvn sum Zinjanthropus, Homohabilis, Skull (skøltur) 1470 og "Lucy", hin funni luturin hjá Donald Johanson. Við vissu er okkum sagt, at hetta vóru forfedrar mannaættarinnar.

Nú, er tað soleiðis? Sjálvandi er almikið av vandamálum á vegnum. Lord Solly Zuckerman, ein leiðandi enskur anatomistur (kropsbygnaðarfrøðingur) hevur í fimtan ár kannað leivdirnar av Australopithicines. Niðurstøða hansara er, at hesar leivdir heilt og fult eru apur. Eisini Dr. Charles Oxnard, fyrrverandi við University of Chicago, nú á University of Southern California, hevur gjørt margfaldar teldugreiningar við hesum beinum, og niðurstøðan er at Australopithicines gingu ikki upprættir, soleiðis sum áður varð hevda, men at teir gingu á knúgvunum og høvdu langar armar. Als ikki forfedrar okkara, men rætt og slætt apur.

Lord Zuckerman segði, at um menniskjað hevði ment seg frá eini apu-forfedra, so var hetta farið fram uttan at lata eftir seg eina einatu slóð í fornleivdunum. Er hetta dámurin sum ungdómur okkara fær í skúlunum í dag ? Ein ungur maður, sum fyri kortum tók eitt skeið í mannafrøði á University of Florida segði mær, at hann var bilsin, at professarin við endan av skeiðnum var so mikið rættvísur, at hann beint út greiddi flokkinum frá, at alt, sum tey høvdu lært ígjøgnum lestrarskeiðið, einans var tómt høvuðbrýggj. Hann segði, at einki av tí hevði hald í veruleikanum.

**Hvussu eru røturnar?**
Spurningur: Er hetta sett í verk av vísindamonnum ella av svikamonnum? Er menningarlæran størsta skrøgg alra tíða? Um so er, hvat eru motivini hjá evolutiónistunum?

Má eg siga tær, at hetta er ikki serliga áhugavert, ei heldur láturligt; hetta er sera, sera álvarsamt. Tað er altíð týdningarmikið at fara til orsøkina – antin tað snýr seg um sjúkdóm, eina rørslu, ella eina lívsáskoðan – fyri at finna røturnar. Uttan iva hevur menningarlæran verið hitt mest ávirkandi ástøði í tjúgindu øld. Hon hevur framleitt ótrúlig úrslit. Hvat hevur hon framleitt?

Hon hevur framleitt nasismuna. Darwin skrivaði eina bók við heitinum "Origin of Species" (við undirheitinum: Preservation of Favoured Races in the Struggle for Life). Fyri Hitler, sum var svorin evolutionistur, var tað bert eitt lítið stig at fara frá "the survival" (hini yvirlivandi (rasu) til "the dominance" (hini ráðandi rasu).

Aftur og aftur goysti Mussolini um seg við málburði menningarlærunnar. Eisini hann var svorin evolutionistur, sum háðaði ástøði um frið, íð ikki tektist menningar ástøðinum, men at bardagin (kríggið) fór at seta ferð á tilgongdina við evolutiónini, sum var hægsta mál hansara. Hugsa um týningina í seinna heimsbardaga. Er hetta smávegis tilburður?

Ella hugsa um Karl Marx sum gjørdist so ásttikin av menningarlæruni, táið hann las bókina hjá Darwin, at hann nú helt, at vísindaligi grundvøllur kommunismunnar var opinberaður. Táið kommunisman og øll onnur gudloysis hugtøk ikki trúgva á ein skapara, verða tey noydd at greiða frá heimsins tilveru við menningarlæruni. Marx helt, at hann hevði funnið hetta í Darwinismuni. Hann var í slíkan mun ásttikin av hesi læru, at hann ynskti at víga bók sína "Das Kapital" til Charles Darwin. Til alla lukku var kona Darwin so mikið at sær komin, at hon ráddi honum frá at góðtaka hesa "æru". Grundarlagið undir kommunismuni í dag er út í æsir menningarlæran. Eg las nakað, sum ein ráðharri úr Asia skrivaði. Hann skrivaði at táið kommunistarnir yvirtóku bygd teirra, tá byrjaðu teir við tað sama at læra fólkið menningarlæruna, grundvøll kommunismunnar. Hetta er ikki einans vanligt eystanfyri, men eisini í Amerika hava vit sekulera (verðsliga) humanismu, sum ógvuliga avgjørt byggir á menningarlæruna – so nógv at Humanist Association útnevndi Carl Sagan sum "Ársins Humanist" fyri hansara røð um menningarlæruna, sum var í tíggju pørtum. Tey fyrstu tvey punktini í "Humanistiska Manifestinum" viðgera heilt og fult menningarlæruna, tey greiða frá, at menniskjan er ein náttúru úrdráttur, framleidd av umhvørvinum, at menniskjan var ikki skapt, men var útviklað.

Vit síggja, at annaðhvørt vit tosa um nasismuna, fasismuna, kommunismuna ella humanismuna, so er menningarlæran grundsúlan, sum heldur øllum saman.

Hvat annað hendi í síðstu øld sum úrslit av ástøði menningarlærunnar? Í landi okkara og um alheimin er ein ómetalig kynslig kollvelting. Alt er loyvt. Fyrst var tað pornografi, síðani hjúnabandsbrot og hor, síðani blóðskemd (incest) og homoseksualitetur; og nú eisini bestialitetur. Hesin kynsligi ólevnaður hevur ført við sær ómetaligar kynsjúkur. Í dag eru úti millum manna í landi okkara 25 ymisk sløg av smittandi kynsjúkum. Hví er soleiðis vorðið?

**Hví er soleiðis vorðið?**
Evolutión vil sleppa av við Gud, og tí er einki endamál; tí uttan Gud er einki endamál við tilveruni. Kanska er eingin máliska meiri vanstyggilig í oyrunum á einum evolutiónisti enn "teleology", sum er tann læran, at í øllum lutum og í øllum tilburðum, fer tað fram íð hevur tilætlað endamál. Hóast eygað hevur sítt endamál, so hevur tað fyri einum evolutiónisti einki endamál – tað er bara har av tilvild. Er einki endamál, so er eingin meining; er eingin meining so er eyðsýniliga alt loyvt.. Eyðsýnt er tá eingin treytaleysur moralskur sannleiki.

Aldous Huxley, leiðandi gudloysingur og menningarlæru fjeppari, skrivaði bókina "Brave New World". Hann segði hetta: "Mín grundregla var, at eg ynskti ikki at geva heiminum meining; tískil vildi eg látast sum hann onga hevði, og eg var uttan trupuleikar førur fyri at finna nøgdsamar orsøkir fyri mínum varhuga...... Fyri meg sjálvan og uttan iva fyri mítt samtíðarfólk hevur lívsáskoðanin um meiningsloysi í høvuðsheitum verið eitt tól, sum hevur skundað undir frígeringina. Frígeringin vit tráaðu eftir var samstundis frígeringin frá einum ávísum politiskum og fíggjarligum kervi (kapitalismuni) og frígeringin frá einum ávísum moralskum háttarlagi. Vit mótmæltu siðalæruni, tí hon legði seg út í okkara kynsliga frælsi."

Ein annar víðagitin, eisini við navninum Huxley, var Sir Julian Huxley, abbasonur Thomas Huxley, kendur sum "Darwin`s Bulldog". Sir Julian var fyrrverandi leiðari í UNESCO (United Nations Educational Scientific Cultural Organisation), og helst heimsins mest víðagitni lívfrøðingur við atliti til menningarlæruna. Eg gjørdist bilsin táið eg í eini sjónvarp sending hoyrdi hann siga: "Vit øll hoppaðu uppá "Origin" (tað merkir Origin of Species) tí..." Hví? Hvat fór hesin mæti vísindamaður at siga? Hví hoppaðu tey uppá "Origin"? Vit kunnu halda at dómurin hesum viðvíkjandi var liðugur, tí vísindaligu prógvini, íð sakliga vóru savnaði saman, vóru so veldig og hugbindandi, at ein var noyddur at góðtaka trúvirði teirra. Men tað var ikki tað hann segði. Sir Julian Huxley segði: "Vit øll hoppaðu uppá "Origin" tí hugmyndin um Gud legði seg út í okkara kynsliga moral."

Vísindaligir veruleikar? Ella stórt svik? Trúverdir vísindamenn? Ella svikamenn?

Eg eri glaður at kunna siga frá at ongantíð áður hevur menningarlæran verið meiri avskepla enn hon er nú. Hon er flýggjandi yvir háls og herðar. Víðagitin vísindafólk kring alheimin vakna nú við kaldan dreym úr hesum villunar ástøði. Tey kalla hetta eitt álvakent skrøgg; ein myta; listilærdar søgur pentaðar saman; ein skemdargerð móti ungdómi okkara um alheimin.

Hvussu er og ikki, úrslitið av hesum sviki hevur verið vanlukkuligt, handan førleika mannaættarinnar at ætla um. Neyðugt er at fara til orsakarfrøðina, til røturnar. Eg ælti mær áhaldandi at berja niður hetta vanskepilsi av einum ástøði, sum hevur plágað tjúgindu øld. Eg trúgvi, at ógvuliga skjótt fer allur byggningurin at rapla.

Sannleikin er, at ein Skapari er, sum hevur skapt okkum, og sum hevur sent son sín at endurloysa okkum; at tey sum seta sítt álit á Jesus Kristus, hin livandi upprisna Frelsara heimsins, tey fáa fyrigeving syndanna, gávu hins æviga lívs, meiningina við tilveruni, endamál lívsins og til seinast eitt ævigt heim í Himmlinum.

***Skrivað hevur D. James Kennedy, Ph. D. Loyvi at seta í føroyskt blað er fingið til vega frá kelduni: Christian Assemblies International. Týtt úr enskum hevur Victor á Lakjuni***